## HEILSANIR



**Mín fitti Otto**
Tillukku og gleði á 14 ára føðingardegnum, sum var nýggjársaftan. Tú ert so fittur og góður við meg.
**Ynskir systir tín Oddbjørg**



**Góða fitta Sólvá**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum 5. jan. Stuttligt var at ganga millum geitirnar í Zoologiska hava. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Heilsan Svenning-Olaf, Heidi, Angela, babba og mamma**



**Góði elskaði Otto**
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum, sum var nýggjársaftan og alt tað besta í nýggjá árinum. Jesus pápi verið hjá tær.
**Ynskja mamma, babba og Eyð**



**Góði Elmar ommubeiggi**
Hjartaliga til lukku við stóru døgunum. Alt tað besta í framtíðini. Ynskja vit øll.
**Petur Martin og Kristian**



**Góði fitti Bartal**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 4. jan.
**Kærar heilsanir frá mammu og pabba**


30,- kr. Sosialurin

**Heilsanir**

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .........................................................................
Bústaður: ...................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«


# StÍF stuðlar innsavningini hjá Reyða Krossi

**Nevndin í StÍF hevur gjørt av, at peningurin, sum kemur inn í sambandi við dystin hjá 1. mansliði móti Kyndli á Skála sunnudagin, fer óskerdur til innsavningina hjá Reyða Krossi**

NEYÐHJÁLP
*tíðindaskriv frá StÍF*

Nú byrjar so uppruddingin eftir vanlukkuna í Suðurasia. Nú skal gerandisdagurin hjá fólkinum í vanlukkuøkinum fáast upp á pláss aftur. Uppgávurnar eru so ógvusliga stórar, at tað fer at taka drúgva tíð, áðrenn árinini av vanlukkuni eru burtur og alt er komið aftur á beint, men neyðhjálpararbeiðið kann bøta eitt sindur um tað.

Í tí sambandi hevur nevndin í StÍF gjørt av, at allur peningurin, sum kemur inn í sambandi við dystin hjá 1. mansliði móti Kyndli sunnudagin, fer óskerdur til innsavningina hjá Reyða Krossi.

Í felagnum ásanna vit at tað ikki er nógv, sum vit kunnu gera, tá ein so ræðulig vanlukka rakar. Vit sita í tryggari frástøðu frá økinum og kunnu taka støðu til tað ræðuliga sum vit síggja í miðlunum.

Vit kunnu tó vera við til at savna so frægt av peningi inn til hjálpararbeiðið sum tilber. Á tann hátt kunnu vit stuðla teimum, sum hjálpa teimum neyðstøddu í økinum, nú tey eru so illa sperd.




*Allur peningurin, sum kemur inn sunnudagin, fer óskerdur til Reyða Kross*

Og tað er tað vit vilja við hesum tiltakinum.

Atgongumerki til dystin kostar vanliga 50 krónur og tað ger tað eisini sunnudagin. Men hava fólk hug til at stuðla við einari størri upphædd, eru tey hjartaliga væl komin at gera tað tá goldið verður við inngongdina til høllina. Peningurin, sum kemur inn fer óskerdur til Reyða Kross, og felagið vónar, at fólk stuðlar tiltakinum væl.

# Stór stuðuls-Parakapping í Bridge

BAROMETUR-KAPPING
*Bogi Simonsen*

Leygardagin 8. januar 2005 skipar Bridgehúsið í Havn fyri stórari almennari parakapping í Bridge.

Kappingin verður skipað sum ein barometur kapping. Spæld verða 30-35 spøl.

Byrjað verður kl. 13.00, og er kostnaðurin 100 kr. fyri hvønn luttakara. Innkomni peningurin fer óskerdur til Reyða Kross, føroyadeild.

Av tí, at vænta verður við met stórari luttøku, er neyðugt at boða frá luttøku seinast fríggjakvøldið 7. januar kl .20.00 hjá onkrum limi í húsanevndini.